# Veikastu børnini verð

## Um eingin sáttmáli nú verður gjørdur millum Heilsumálaráðið og Ergoterapeutfelagið verður einki sum eitur at geva børnum við breki ella varandi sjúku nakra ergoterapi

Randi Jacobsen



*Rebekka Kirke er eitt av børnunum, sum framvegis gongur til venjingar hjá Beintu Lassen og starvsfelaga hennara Mariu Svabo Hansen. Henda venjingin styrkir armarnar, og hon venur konsentrasjón við at kasta ringarnar beint*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Umleiðis hundrað børn við ymiskum brekum ella sjúkum fingu ergoterapi-viðgerð í Ergoterapiini hjá Beintu Lassen í Havn. Børnini komu úr øllum landinum.

Men aftaná 31. juli noyddist hon at venda teimum í hurðini, tí nýggj kunngerð segði, at Almannastovan ikki longur skuldi gjalda alla rokningina. Heilsutrygd skuldi gjalda helvtina, men tað var treytað av, at sáttmáli var gjørdur millum Heilsumálaráðið og Ergoterapeutfelagið, og sáttmáli var framvegis eingin.

Beinta Lassen vildi tó ikki vísa øllum børnunum frá sær. Henni tókti synd í børnunum og valdi 32 børn burturúr. Foreldrini fingu at vita, at tey skuldu bara koma við børnunum, og rokningin mátti bíða.

### Ber ikki til

– Men nú havi eg ikki ráð longur at fíggja uppgávuna fyri tað almenna, sigur Beint Lassen. Ei heldur hava foreldrini ráð, sum í fleiri førum arbeiða niðursetta tíð, at leggja út fyri so nógvar mánadir, sum hettar mál tekur, og av tí at eingin sáttmáli er, veit eingin hvørji brek sáttmálin fer at dekka. So tað at Aksel sigur, at øll fáa endurrindað afturvirkandi, kann ikki brúkast til nakað, tí samstundis sigur hann, at tey fara at endurrinda til teirra, sum verða fevnd av sáttmálanum. Ótryggleikin ger, at børnini líða, sigur Beinta Lassen.

Hon heldur tað vera skelkandi, at Heilsumálaráðið er so trekt við at gera ein sáttmála, sum ergoterapeutarnir kunnu góðtaka. Sáttmálin, sum ergoterapeutarnir vilja hava, skal vera á leið sum sáttmálin hjá fysioterapeutunum, sigur Beinta Lassen.

### Ávíst av lækna

Hon var skakað av at lesa og hoyra Aksel V.Johannesen, landsstýrismann siga, at ergoterapeutarnir, sum eru privatir, sjálvir meta um tørvin, sum børnini hava á ergoterapi.

Eingin er komin til hennara uttan ávísing frá lækna. Nakað annað er, at bara terapeutar hava vitan at kanna børn fyri SI- trupulleikar. Heldur ikki allir ergoterapeutar hava hesa vitan, sum krevur eyka útbúgving.

Beinta Lassen byrjaði fyritøku sína í 2000, og beinanvegin vísti Landssjúkrahúsið tveimum børnum við føroysku sjúkuni til hennara.

Fleiri børn komu aftrat við alsins sjúkum og brekum, so hon setti ein ergoterapeut aftrat í starv, og áðrenn skipanin broyttist vóru tær fýra, sum arbeiddu við at hjálpa børnunum.

Nógv ymist bagir børnum, sum hava tørv á egoterapi.

### Kunnu hjálpast

Ein bólkur eru børn, sum væl eru før fyri at standa uppi, men ófriður er á teimum, tí tey klára ikki at standa still, og tey órógva allan skúlaflokkin. Tey kunnu tykjast at hava DAMP, men ergoterapeutarnir síggja, at tað, sum bagi,r er veikir vøddar. Hettar ger at grund, spenningurin er ov veikur, og at tað at standa ella sita still er ógjørligt.

Onnur børn eru øvugt ov still og ov bangin, tí tey hava eina ov sensitiva sansaskipan, og kenna alt nógv ógvusligari enn vanligt.

– Um tey børnini sum hava trupulleikar við sansaskipanini, antin hon virkar ov væl ella ov illa, fáa ergoterapi, kunnu tey eftir einum ári koma fyri seg og virka væl millum onnur børn, og fylgja við innlæringini, sigur Beinta Lassen.

### Ymiskar diagnosur

Tá ið mest var at gera, vóru umleið 100 børn í ergoterapiviðgerð við nógvum ymiskum diagnosum, vøddasvinni, føroyska sjúkan, Down Syndromi, autisme, ADHD, asberger, blóðtøppi eftir skurðviðgerð, cerebral paresu o.a.

Børnini høvdu ávísing frá antin Sernámsdeplinum, barnavernd, heilsusystur, kommunulæknum, serlæknum og øðrum, men øll skuldi hóast tað var viðmælt ergoterapi av fakfólki, umvegis læknan eftir einari læknaváttan uppá, at tey høvdu tørv.

– Tað er rætt, at vit hava kannað børn fyri, hvønn tørv tey hava. Men tað kemur bara av, at bíðitíð til at sleppa til kanningar á Sernámsdeplinum hevur verið hálvt annað ár, og tí eru foreldur komin við børnum til okkara, og tey hava sjálv goldið fyri kanningina.

### Nógvar broytingar

Beinta Lassen sigur, at alt riggaði væl, til Rósa Samuelsen í mars 2009 broytti kunngerðina, soleiðis at Heilsutrygd (tá sjúkrakassarnir) skuldi lata stuðul, men treytað av sáttmála við Ergoterapeutfelagið.

Sjúkrakassarnir kundu ikki fara í samráðingar um at gera sáttmála, tí teir skuldu takast av, og so varð alt útsett.

Kunngerðin skuldi koma í gildi 1. januar 2010, so var tað 1. apríl, og tað endaði við, at kunngerðin kom í gildi 1. august í fjør.

– At HMR ella AMR kritisera okkum privatu fyri at gera kanningar og viðmæla ergoterapi hongur ikki saman, tí so seint sum í 2009 bað Almannastovan okkum gera eina meting av øllum børnunum, sum fingu viðgerð her, sigur Beinta Lassen.

### Almannastovuni vantar innlit

Hon heldur lítið um vantandi forstáilsi hjá Almannastovuni fyri trupulleikunum hjá hesum børnum og mátanum, sum ergoterapeutarnir viðgera uppá.

– Vit hava fleiri ferðir í hesi 10 árini, vit hava veitt ergoterapi til børnini í Føroyum, bjóða Almannastovuni á vitjan, so tey fingu innlit í okkara arbeiði, men í 10 ár er eingin komin frá Almannastovuni, hóast tey